

memo board



## Jólakapping

nú ljóðar startskotið til fyrstu kappingina í ph_1 nakrantíð. Talan er um eina kapping, sum fer at halda fram til jóla. Í seinasta blaðnum áðrenn jól verða vinnararnir funnir og kunngjørdir. Seinasta blaðið áðrenn jól kemur út tann 18. desember.

Í bløðunum fram til jóla fara vit at hava tríggjar ymiskar kappingar. Hóast kappingarnar eru tríggjar í tali, so verða vinnarar bert drignir ta einu ferðina.

Til ber at ogna sær fleiri lutaseðlar til kappingina. Tað ber nevniliga til at luttaka í øllum trimum kappingunum, tó ikki fleiri ferðir í somu kapping. Sostatt ber til hjá hvørjum einstøkum at fáa í mesta lagi og tilsamans tríggjar lutaseðlar til kappingina. Um luttakarin ynskir at ogna sær tríggjar lutaseðlar til kappingina, noyðis viðkomandi at senda svar inn til hvørja einstaka kapping. Til ber ikki at senda ein seðil við øllum trimum svarunum.

Tveir hepnir vinnarar fáa eitt gávukort hvør á 500 krónur frá 3´aranum í SMS. Harumframt eisini eina spildurnýggja tónleikaárbók fyri árið 2002. Harumframt fáa fimm aðrir luttakarar eitt eintak av tónleikaárbókini.

Hesa ferð er kappingin skipað soleiðis: Vit skriva eina reglu úr einum kendum føroyskum sangi. Tit skulu siga okkum, hvør bólkur ella einstaklingur syngur og spælir, og hvussu sangurin eitur.

Reglan sær soleiðis út: »... leiði teg í eina verð, sum tú aldri fyrr hevur sæð...«

Tey, ið halda seg vita svarið kunnu: senda ein teldupost á teldupostbústaðin: ph_1@sosialurin.fo ella skriva til:

<ph_1>
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til ber eisini at senda fax á nummar 31 47 20
Merkið brævbjálva, teldupost ella fax: »jólakapping«
Freistin til at luttaka í hesi kappingini er mánadagin 18. november kl. 12.00.

– Tað er nógv betri at vita ov lítið enn at vita ov nógv

Samuel Butler

– Man skal ongantíð gleða seg fyrr enn dagin eftir

Robert Storm Petersen



– Liv títt egna lív áðrenn tú doyrt tín egna deyða

Latínskt orðatak

– Eitt sindur ov seint er alt ov seint

Týskt orðatak



# murder by numbers – iskoldt morð

Eftir øllum at døma eitt fullkomuliga tilvildarligt morð. Ein ung kvinna verður funnin dripin úti í skóginum uttan fyri ein lítlan bý í USA.

Skjótt vísir tað seg, at talan er um alt annað enn tilvild. Tað vil siga, at kvinnan varð vald av tilvild, men alt annað er fyrireikað niður í minstu smálutir.

Brotsmenninir eru tveir studentaskúlanæmingar, Richard og Justin. Hin fyrri er ríkmanssonur, gløggur og væl dámdur í skúlanum. Hin seinni kemur úr miðalstættini, er eisini sera gløggur, men er ein einari og av tí sama ikki serliga væl dámdur. Av lyndi tveir fullkomnir mótsetningar, ið tó hava funnið saman. Saman leggja teir eina ætlan um at fremja tað fullkomna drápið, ið ikki kann uppklárast. Tað verður uppgávan hjá løgreglukvinnuni Cassie Mayweather at finna út av, hvør drap ungu gentuna. Í fyrstani sær tað út sum um talan er um eitt tilvildarligt morð, men skjótt fær Cassie illgruna til ríkmanssonin Richard, og seinni eisini Justin.

Sandra Bullock er framúrskarandi í leiklutinum sum Cassie. Cassie er ein kvinna, særd inn á sálina. Av ringum royndum hevur hon eitt forskrúvað forhold til mannfólk, og tað gevur henni trupulleikar í arbeiðinum. Hon ber orð fyri at lokka mannfólk at sær fyri síðan at skumpa teir burtur. Hon er ikki væl dámd og hinir løgreglumenninir hava ongan hug at arbeiða saman við henni. Tí verður tað Sam við feskum løgregluskilti, ið skal arbeiða saman við Cassie.

Sam og Cassie fáa illgruna til teir báðar Richard og Justin, og síðan byrjar eitt spæl um, hvør er gløggari og hvør snýtir hvønn – løgreglan ella ungu menninir.

Filmurin er eisinii um tveir drongir, ið eru sleptir uppá fjall av foreldrum og heimum sínum, keða seg í skúlanum og leita eftir onkrum øðrvísi, ið kann geva spenning í lívinum. Úrslitið gerst ein brennandi áhugi fyri at fremja tað fullkomna drápið. Tað er "tað fullkomna drápið", ið tvinnar teir saman – annars hava teir einki í felag og einki annað at tosa saman um.

Tú keðir teg ikki eina løtu, teir tveir tímarnar, filmurin varir. Tað er ikki nakar av høvuðsleikarunum, ið ikki megnar sína uppgávu, og umframt Sandru Bullock er serliga Michael Pitt framúrskarandi í leiklutinum sum einarin Justin. Tað er at taka munnin ov fullan at siga, at søgan er genial, men hon er tó so mikið væl skrivað, at hon ber filmin, væl hjálpt av góðum leikarum.



### fakta um murder by numbers

| | |
|---|---|
| leikarar: | sandra bullock, ben chaplin, ryan gosling, michael pitt |
| leikstjóri: | barbet schroeder |
| longd: | 120 min. |
stað: | havnar bio, um tú ert 16 ár ella eldri |

## Ung orð: Ein føroysktímí

**"...um stovnssjálvljóðið ikki broytist, so er endingin -ir, tað eru allíkavæl..."**

Eg siti ein heilt vanligan morgun í einari heilt vanligari skúlastovu. Eg havi føroyskt og lærarin tosar um mállæru. Tað er sikkurt skilagott, tað, sum hann sigur, og eg burdi kanska fylgt við, men hann tosar um tað sama, sum hann tosaði um í fjør, og fyrra árið og helst eisini árið fyri tað. Hví gera lærarar altíð tað? Eg meini, at siga tað sama 100 ferðir! Teir burdu fangað tað; hava tey ikki lært tað enn, so koma tey ongantíð at læra tað, KOM VÍÐARI MAÐUR!

Men mállæra kann sikkurt vera áhugaverd, okey burtursæð frá mánamorgun klokkan 8 Tað er jú læran um mál, mál læra, heh, kul, ársins lummafilosofi - gott hann sjálvur! Hann gavst við at tosa. Hann og hansara pedagogikumflipp - "hava ein interaktivan tíma, draga næmingin við..." Nú er sikkurt ein ella onnur klikkað mállæruuppgáva á skránni. Og vissi hann skal spæla ordiliga festligur, so verða vit koyrd í bólkar, halló maður flyt til Russlands, so kunnu tú og tínar bolsjevikkavinir arbeiða í bólkum. Eg og Anders ætla okkum so í hvussu er at arbeiða sjálvstøðugt. Ja, alvorliga sjálvstøðugt, eg ætli mær so ikki at arbeiða saman við honum.



Tað hevði faktist verið nokso kul at sloppið at arbeitt sjálvstøðugt. Eg her og Anders har. Havt meirilutan fyri meg sjálvan, sjálvur kunnað avgjørt, hvussu eg loysti mállæruuppgávuna. Eg her og Anders har. Men "dream on" tað verður neyvan í hesi øldini, at eg sleppi tað. Lærararnir halda, at pedagogikum "rules!" "tað sameinir næmingarnar og ger, at teir í framtíðini duga betur at virka sum ein eind" Ein eind! Eg havi einki ynski um at vera ein eind. Eg helt at uppgávan var ein mállæruuppáva, men nú er eindin uppgávan. Henda eind, fær hon tíð, fer hon kanska at hugsa um, at tað er nakað, sum eitur mállæra.

Men tað gert also ikki við. Hevði eg verið eldri, hevði eg kunnað farið at lisið føroyskt. Hevði eg lisið føroyskt, hevði eg kunnað verið lærari, flott hugsað hann sjálvur, tað bólta bara vísdómsorð úr tær í dag.

Sakin klokkan er 8.38, bara 7 minuttir afturat, so er tímin liðugur. "Eg" má heldur fara í gongd við hesa uppgávuna: "Ódnin ýl__ uttanfyri" "ir"; "Eg sovnaði og datt á gólv__" tað má so verða "ið"; "Tjaldri_ misti_ anna_ eyga_" "ð onki ðð" hmm... hugvekjandi, mennandi, kveikjandi. Bara 2 minuttir afturat.

Eg havi funnið útav tí sjálvur, roknað tað út. Um eg nakrantíð skal loysa mállæruuppgávuna einsamallur má annað skinn takast um bak.

Eg fari at lesa føroyskt.

"...tvey undantøk, høgga og selja..."

**Jóhannes og Snorri**